ítróttur

Nr. 182 • fríggjadagur • 24. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Tað gongur framá hjá Toda, men sjálvur heldur hann, at tað er eyka keðiligt at vera skaddur júst nú, tá hann annars kundi givið sítt ískast at hjálpa liðfeløgunum

Nýggir tónar í Parkini

Eftir at stjørnurnar høvdu smoygt seg í stríðshamin, eydnaðist tað teimum at vinna, meðan tað ikki eydnaðist hjá Brøndby, sum spældi væl, og hjá oddaliðnum, FCM, at fáa meiri enn javnleik á heimavølli

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Sjey stig í sjey teimum fyrstu umførunum. Tað var støðan hjá FCK, táið teir mikukvøldið runnu inn á heimavøllin í Parkini. Broytingin hevur verið ógvuslig. Fyri trimum mánaðum síðani vunnu teir í somu viku steypafinaluna og meistaraskapin. Síðani hevur gingið beint skeiva vegin. Fyrstu ábendingarnar um, at tað vóru ov nógvir, sum sóladu sær í gulli og skreyti og ikki arbeiddu nóg nógv, sóust í Klaksvík fyrr í summar. Tá vísti KÍ besta avrikið á árinum, men tað var mest sum ov nógv av tí góða, at teir skuldu vinna á danska meistaraliðnum.

FCK hevur ikki megnað at funnið rætta hugburðin aftur. Teir duttu úr Europa Cup eftir eyðmýking á heimavølli, og sunnudagin vórðu teir enn eina ferð eyðmýktir, táið Brøndby vitjaði. Undan mikukvøldinum hevði eitt sindur kroysti venjarin, Hans Backe, tikið avleiðingarnar. Fýra spælarar vóru skiftir út. Eitt nú fekk Peter Møller møguleikan í álopinum, har hann var undir liðini á Zuma, meðan Álvaro Santos ikki slapp upp í part.

Todi Jónsson er framvegis skaddur. Á heimasíðu síni sigur hann, at sjálvandi hevur vánaliga gongdin hjá FCK harmað hann, og at tað er eyka keðiligt, at hann ikki júst nú hevur møguleika at hjálpa til. Tað gongur rætta vegin hjá honum, men ikki so skjótt.

Mikukvøldið vóru steypini frá fyrr í summar goymd væl og viðiliga burtur. FCK var í arbeiðsklæðum móti AGF, og tað eydnaðist at vinna. FCK vann 2-1. Stig Tøfting skoraði málið hjá AGF, og Tøfting og hinir í AGF skúmaðu. Teir hildu seg vera snýttar, tá ið linjuverjin kolldømdi mál, sum teir skoraðu til 1-1. Svenski AGF venjarin fór so mikið langt, at hann segði seg harmast um, at tað enn eina ferð varð staðfest, at dómarar og linjuverjar høvdu ilt við at standa fyri trýstinum, sum teir altið eru undir í Parkini.

FCK var frammanfyri 2-0, áðrenn AGF fekk mál. Álopsspælararnir hava framvegis trupulleikar. Miðvallararnir Magne Hoseth og Hjalte Bo Nørregaard vóru FCK málskjúttar.

FCM, Esbjerg og Brøndby hava staðið seg best í sjey teimum fyrstu umførunum. Øll hesi vóru á heimavølli mikukvøldið, og einki teirra fekk fulla úrtøku. Brøndby hevði vitjan av FC Nordsjælland. Hjá gestunum var setningurin at halda tørn um tað, sum teir høvdu við sær, og tað eydnaðist. Teir hava í summar fingið nýggjan málverja, og hann var fantastiskur. Brøndby spældi væl, og teir høvdu fleiri góðar málmøguleikar, men málverjin vardi væl fyri.

Esbjerg hevði vitjan av OB, sum vann 4-2. Talan var ivaleyst um besta fótboltsdystin, sum er spældur í Danmark í hesum kappingarárinum. Toppskjúttin síðsta kappingarár, Steffen Højer, var settur á OB beinkin. Hann kom á vøllin beinanvegin eftir steðgin, og tað var vorðið sum innskifting. Steffen Højer skoraði tvey mál, og einki man vera at ivast í, at hann verður á vøllinum frá fyrsta bríksli næstu ferð.

FCM hevði vitjan av Viborg, sum sunnudagin vísti elendigt avrik, tá ið teir taptu móti Randers. Frammanundan hesum dystinum hevði FCM vunnið allar nýggju ferðirnar, sum teir høvdu roynt seg á SAS arenuni, sum nýggi heimavøllurin hjá teimum eitur. FCM er framvegis ósigrað á nýggja heimavøllinum, men í síðsta minutti mistu teir fyrstu stigini. Viborg javnaði til 1-1. Mohammed Zidan kom ikki á málskjúttaralistan.

AaB hevur havt syndarliga byrjan í hesum kappingarárinum. Hesa ferð høvdu teir vitjan av Randers, sum er uppflytari, og sum fyri stuttum megnaði 0-0 móti FCK og at vinna 1-0 á Viborg. Hjá AaB gjørdust fyritreytirnar uppaftur torførari, tá ið teir eftir tíggju minuttum mistu ein mann. Men AaB smoygdi seg í stríðshamin, teir spældu væl, og teir vunnu 3-0.

Uppflytararnir úr Silkeborg løgdu eftir summarsteðgin fyri sum eitt ódnarveður. Men nú gongur meiri striltið. Mikukvøldið taptu teir fyri fjórðu ferð á rað. Herfølge, sum frammanundan hevði tapt fýra ferðir á rað, fór úr Silkeborg við 4-2 sigri. Trý av málunum skoraðu teir í hornasparksstøðum, sum teir søgdu seg hava arbeitt nógv við undir venjing.

Heidi endaði aftast

Hósmorgunin var Heidi Andreasen aftur í hylinum í Athen, tá ið hon svam innleiðandi í 200 metrar blandað, men hesaferð gekk einki serligt.

PARALYMPICS
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Tað gekk einki serligt hjá ungu eiðisgentuni Heidi Andreasen, tá ið hon hósmorgunin svam innleiðandi umfar í 200 metrar blandað kappingini. Heidi endaði aftast í sínum bólki, og samanlagt endaði hon sum nummar níggju av teimum ialt níggju luttakarunum. Tað merkir, at Heidi sum tann einasta ikki var við, tá ið finalan í 200 metrar blandað bleiv svomin seinni í gjár.

Í dag skal Heidi svimja kapping í 400 metrar frí.

Jón Rói aftur fult

Fyri aðru ferð á rað eydnaðist tað mikukvøldið Frem at fáa fult, og nú eru teir omanfyri uppflytingarstrikuna

DANMARK 1. DEILD
Jóannes Hansen

Eftir at Frem nakrar ferðir ikki hevur havt eydnuna við sær, eydnaðist tað mikukvøldið at vinna fyri aðru ferð á rað. Hesa ferð var Frem í Gladsaxe og vitjaði AB. Frem vann 2-1. Teir fingu bæði málini undan steðginum. Tað fyrra stútaðu teir eftir hornaspark og aftur og fram, og tað seinna var brotsspark eftir stórt kiks í verjuni.

Tá ið tað restaðu tjúgu minuttir, minkaði heimaliðið um munin. Síðstu løtuna var stórur spenningur, men Frem megnaði at halda tørn.

Jón Rói Jacobsen var allar 90 minuttirnar í Frem miðverjuni, og hann fær enn eina ferð gott skoðsmál. Onkra ferðina var hann við í álopunum, og tá ið støðan var 1-0, var tað umreppið, at hann skoraði við høvdinum. Gunnar Nielsen hevur sitið so trúgvur á beinkinum sum eykamálverji alt hetta kappingarárið, og tað gjørdi hann eisini mikukvøldið.

Milan heldur fram í VB

VB hevur á heimasíðu síni boðað frá, at Milan Kulic eisini komandi tvey árini fer at spæla fótbólt í Vági.

Og sum vera man, so er hetta eisini nakað, sum tey í Vági fegnast um. Milan taldist millum avgjørdu lyklaleikararnar, tá tað í 2000 fyri higartil einastu ferð eydnaðist VB at vinna kappingina í bestu mansdeildini. Serstakliga er tað sum sambindingarliður millum miðvøll og álop, at hann hevur sýnt gott hegni, og tað hevur eisini ljóðað, at pengasterku feløgini í høvuðsstaðnum hava ligið framvið eftir jugoslaviska spælskiparanum.

Samstundis hevur felagið boðað frá, at eitt venjaraskifti stendur fyri framman. Í ár hevur Hans Nielsen staðið við høvuðsábyrgdini av liðnum, men hann hevur saman við familjuni gjørt av at flyta norður um Suðuroyarfjørð aftur, og so ber ikki til at vera venjari í Vági. Eisini er greitt, at hjálparvenjarin, Jón Hansen, flytir aftur til Noreg í heyst, og soleiðis verður hann heldur ikki partur av ætlanunum hjáVB fyri komandi ár.

Sagt verður, at felagið í eina tíð hevur verið kunnað um hetta, men at eingin sáttmáli enn er skrivaðu við nakran venjara.

-jm

AB føroyameistari

Kappingin hjá gentum 12-14 ár varð avgjørd á Skála um vikuskiftið, og ikki óvæntað gjørdist tað AB, sum vann kappingina.

AB hevur í ár havt eitt sera gott lið í deildini, og millum annað hava tær eisini vunnið steypakappingina í deildini, eins og tær vunnu Lemvig Cup, tá tær í summar vóru á uttanlandsferð.

-jm

Nýggj fótbóltssíða

Fótbóltssamband Føroya hevur nú gjørt nýggju heimasíðu sína lidna. Talan er um eina heilt nýggja síðu, sum við undantakið av FSF-búmerkinum ikki tykist hava nakað til felags við gomlu síðuna.

Eitt nú verða tíðindi innan føroyska fótbóltsheimin regluliga løgd á netið, eins og øll rundskriv viðvíkjandi landsliðsúttøkum, dómarayvirlitum, lógarkrøvum v.m. verða løgd út. Snøgt sagt er talan um eina síðu, sum inniheldur tað mesta av tí faktuella, sum tørvur er á at vita innan føroyskan fótbólt.

Síðan sæst á slóðini, http://football.fo

-jm

U-19 landsliðini úttikin

Bæði hjá kvinnum og monnum hava venjararnir nú gjørt av, hvørjir leikarar skulu takast út til U-19 landsliðini, sum í næstum skulu royna seg í altjóða kappingum.

Kvinnurnar skulu til eina sonevnda Mini-kapping í Pólandi, har leikt veðru rmóti Pólandi, Belgia og Kroatia.

Venjari hjá liðnum er Álvur Hansen, og navnlisti hansara til kappngina sær soleiðis út: Randi S. Wardum og Anna Joensen úr KÍ. Kristina D Simonsen, Linda Weihe, Jytta Drangastein og Fríða Beder úr AB. Ása Christiansen, Ása Dam á Neystabø, Unn Kragesteen og Elsa Maria Olsen úr B36. Doris í Garði Joensen, Rakul Magnussen og Mildrið Djurhuus úr EB/Streymi. Anja Klæmintsdóttir úr B68/GÍ. Sigrid Petersen úr ÍF. Heidi á Lakjuni og Jacoba Langgaard úr NSÍ og Mary-Ann Isaksen úr Skjold BK.

Umframt Álv Hansen eru Niklas á líðarenda (ferðaleiðari), Jón Harald Poulsen (hjálparvenjari), Durita Rouch (fysioterapetur) og Sonja á Líðarenda (liðleiðari) við á ferðini.

U-19 liðið hjá monnum fer í næstum undir EM-undankappingina, sum altso verður leikt í Føroyum í ár, og hetta krevur so eisini sínar fyrireikingar. Venjararnir báðir, Abraham Løkin og Pætur Clementsen, hava tikið endaliga hópin út, og hava hesir leikarar fingið boð um at møta til venjingarleguna: Svenn Jacobsen, Poul T. Dam, Páll M. Joensen, John Eivind R. Mouritsen og Emil N. Leifsson úr HB. Tórður Thomsen úr NSÍ. Símun Louis Jacobsen úr GÍ. Jóhan V. Gunnarsson og Ásbjørn V. Gunnarsson úr B36. Fritleif í Lambanum úr ÍF. Jóhan Petur Poulsen og Ovi Magnussen úr B68. Arnbjørn Theodor Hansen úr EB/Streymi. Poul N. Poulsen úr VB og Julian Samuelsen úr KÍ. Hartil eru Jónas Tór Næs, Gunnar Nielsen og Bogi Hermansen eisini í hópinum. Teir spæla allir tríggir í danska Frem.

-jm

So verður Magnus valdur

Loksins kann Flogbóltssambandið seta punktum fyri aðalfundinum, sum uttan iva hevur verið ein av teimum drúgvastu í føroyskari fundarsøgu.

Fundurin varð í síni tíð niðurlagdur, tí einki evni var til formansvalið, eftir at Niclas Joensen hevði tikið seg aftur, men hetta eydnaðist so at finna eina loysn upp á fyri tveimum vikum síðani.

Nýggjur formaður verður Magnus Tausen. Hann hevur áður sitið í nevndini, og tí skal nýggjur nevndarlimur veljast. Hesin verður væntandi Kristianna Dam úr KÍF, sum er einasta evni, sum higartil hevur játtað at stilla upp.

-jm

Føroyingar ávegis skúlafinaluni

Ólavur í Ólavsstovu og Pætur Jørgensen ganga báðir á ítróttarskúlanum í Oure hetta skúlaárið. Sum vera man, so hevur skúlin eisini eitt lið við í stóru donsku kappingini fyri skúlar, og her hevur gingist væl hjá Oure.

Í sínum øki – tað er Eysturfjón – er Oure nú komið fram til hálvfinalurnar. Fjórðingsfinaluna vunnu teir ikki minni enn 9-0 á útivølli, og í Ekstra Blaðnum, sum er høvuðsstuðul til kappingina, varð hetta eisini lagt til merkis. Eitt nú skrivaði blaðið eftir dystin í 1/8-finaluni um liðið, at teir heilt avgjørt vóru ávegis Parkini, har finaludystirnir verða leiktir, og ikki minst fingu teir báðir føroysku leikararnir á liðnum rós fyri síni avrik.

-jm

KÍ pinkur aftur føroyameistarar

KÍ pinkur føroyameistarar 2004: *Aftan frá vinstru: Bára Skaale Klakstein, Betty Vitalis, Ása Klein Olsen, Anna Jakobsen, Mina Sirdal, Gunrid Joensen og Hanna Mikkelsen, hjálparvenjari. Framman frá vinstru: Eyðvør Klakstein, Hallgerð Leivsgarð, Karla Matras, Gudrun West og Tina Joensen*

Annað árið á rað vann KÍ føroyameistaraheitið hjá teimum yngstu gentunum - pinkunum.

Seinna finaluumfarið var í Klaksvík leygardagin, og kappingin stóð millum KÍ, ÍF, AB og VB.

Undan hesum umfarinum lá ÍF best fyri, men KÍ vann allar sínar dystir í seinna umfarinum og fór harvið fram um øll hini liðini.

KÍ piltar føroyameistarar

Fyri fyrstu ferð í 20 ár vunnu piltarnir hjá KÍ um vikuskiftið føroyameistaraheitið. Í seinasta dystinum vann KÍa tryggan sigur á HBb, og so høvdu teir tryggjað sær gullið.

KÍa endaði tvey stig frammanfyri HBa og fimm stig frammanfyri TB.

Kappingin í meistarabólkinum hjá piltum hevur í ár verið millum júst tey trý liðini.

Hini liðini í deildini hava ikki rættiliga megnað at staðið teimum bestu kurl, og av teimum bestu, var tað KÍa, sum hevði munin og vann kappingina.

KÍa fekk 25 av 28 møguligum stigum.

KÍa piltar føroyameistarar 2004. Aftan frá vinstru: Eyðun Klakstein, venjari, Ivan Joensen, Steffan R. Olsen, John Vernar Poulsen, Sørmund Kalsø, Helgi Samson, Heri Klein Olsen, Oddmar Marsten og Gestur Hovgaard, hjálparvenjari. Framman frá vinstru: Aksel Dalsgaard, Heðin Klakstein, Bárður G. Hansen, Ísak Simonsen, Teitur Matras Gestsson, Vilhelm Vilhelmssen, Ragnar Danielsen, Agnar Frederiksen og Emil Simonsen

Danska superligan

	d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 OB	8	5	1	2	19	10	9	16
2 FCM	8	5	1	2	12	10	2	16
3 Brøndby (S)	8	4	3	1	10	5	5	15
4 AGF	8	3	2	3	12	9	3	11
5 Viborg	8	3	2	3	8	9	-1	11
6 FC Nordsj.	8	3	2	3	9	12	-3	11
7 Esbjerg	7	3	1	3	17	12	5	10
8 Silkeborg	8	3	1	4	14	15	-1	10
9 FCK (M)	8	2	4	2	13	14	-1	10
10 Herfølge	8	3	1	4	9	15	-6	10
11 AaB	8	2	1	5	11	11	0	7
12 Randers FC	7	1	1	5	3	15	-12	4

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

Danska 1. deild

	d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 HIK	8	6	1	1	20	9	11	19
2 Frem	8	4	3	1	13	5	8	15
3 Vejle	8	5	0	3	23	19	4	15
4 Sønderjyske E	8	4	2	2	19	11	8	14
5 Fredericia	8	4	2	2	18	10	8	14
6 AC Horsens	8	4	2	2	13	8	5	14
7 Køge	8	3	4	1	21	12	9	13
8 Skjold	7	4	1	2	13	9	4	13
9 AB	8	4	0	4	15	15	0	12
10 Fremad Amager	7	3	2	2	13	8	5	11
11 NFA	8	3	2	3	21	17	4	11
12 Brønshøj	7	2	1	4	14	20	-6	7
13 Næstved	8	1	1	6	7	18	-11	4
14 B 93	8	0	4	4	10	23	-13	4
15 Ølstykke	8	1	1	6	5	24	-19	4
16 Dalum	7	1	0	6	9	26	-17	3

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen (Frem), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)